## Christian Høgni seldur til AB

Tá føroyska kappingin fer í summarfrí miðskeiðis í juli mánaði, skiftir Christian Høgni Jacobsen til danska 1. deildarfelagið. Christian Høgni Jacobsen hevur leingi verið mettur sum ein av bestu føroysku fótbóltsspælarunum, og hann hevur eisini áður roynt seg í donskum fótbólti. Ta ferðina setti ein krossbandsskaði tó ein steðg fyri ævintýrinum, men nú er hann til reiðar at taka eitt nýtt tørn. - Christian Høgni hevur alla tíðina havt ætlanir um at royna seg uttanlands aftur. Og fleiri ferðir hava meira og minni ítøkiligir fyrispurningar eisini verið. Júst hesin møguleikin er tó íkomin hampuliga brádliga, men tá semja fekst í lag millum HB og AB, valdi Christian Høgni at taka av møguleikanum, sigur Jákup í Stórustovu, sum er umboðsmaður hjá Christan Høgna. Í júst lidna kappingarárinum gjørdist AB nummar seks í donsku 1. deild.



# Tað ber ikki til at fanga Sílið

**Dreingirnir hjá Havnar Róðrarfelag vundu burtur úr Junkaranum, sum leingi treiskaðist fyri at vinna dreingjaróðurin**



*Aftur hesa ferð fóru dreingirnir á Sílinum fyrstir um málið. Og tað tykist vera spurningur, um nakar stendur teimum kurl í ár*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**KAPPRÓÐUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var einki at rafla um. Sum á norðoyastevnu so vann Sílið sannførandi sigur í kappingini millum dreingjabátarnar.

Sílið fekk góðan start. Junkarin og Havfrúgvin fylgdu væl við fyrstu løtuna, men so við og við dró Sílið frá kappingarneytunum.

Junkarin royndi fleiri ferðir at svara aftur. Onkra ferðina var um reppið, at Junkarin fekk um róðrið á Sílinum, sum so svaraði aftur, og í endaspurtinum var meiri enn leyst frá Sílinum og aftur til kappingarneytarnar.

Havfrúgvin var væl við fyrstu løtuna, men tað eydnaðist ikki vestmanna-dreingjum at vinna næst-fremsta plássið frá Junkaranum. Harvið var vinnarin tann sami, sum hann var á norðoyastevnu, meðan Junkarin, sum á norðoyastevnu var nummar trý, hesa ferð vann næstfyrsta plássið frá Havfrúnni.

Í fjør vann Havfrúgvin FM, og Sílið vann silvur. Tá var Sílið fremst á norðoyastevnu, meðan Havfrúgvin, sum var næstfremst á Norðoyastevnu, vann á sundalagsstevnu. Soleiðis gekk tað ikki hesa ferð, men enn er eingin orsøk at avskriva allan spenning.

**FM-kappróður**

| 5-mannafør, dreingir | Stig íalt | Sundalagsst. |
|---|---|---|
| 1 Sílið | 14 | 7 |
| 2 Junkarin | 11 | 6 |
| 3 Havfrúgvin | 11 | 5 |
| 4 Tjaldrið | 8 | 4 |
| 5 Teistin | 5 | 3 |
| 6 Strípan | 5 | 2 |
| 7 Tambar | 1 | 1 |
| 8 Blikur | 1 | 0 |
| **6-mannafør, kvinnur** | | |
| 1 Gongurólvur | 13 | 7 |
| 2 Jarnbardur | 13 | 6 |
| 3 Hósvíkingur | 5 | 5 |
| **5-mannafør, gentur** | | |
| 1 Hvassi | 13 | 7 |
| 2 Drekin | 13 | 6 |
| 3 Junkarin | 10 | 5 |
| 4 Firvaldur | 7 | 4 |
| 5 Jallurin | 7 | 3 |
| 6 Blikur | 4 | 2 |
| 7 Tambar | 2 | 1 |
| **5-mannafør, kvinnur** | | |
| 1 Sílið | 14 | 7 |
| 2 Frúgvin | 12 | 6 |
| 3 Erla Kongsdóttir | 8 | 3 |
| 4 Katla | 7 | 5 |
| 5 Ritan | 6 | 2 |
| 6 Báran | 5 | 5 |
| 7 Teistin | 4 | 1 |
| 8 Jallurin | 1 | 0 |
| **6-mannafør, menn** | | |
| 1 Sundabáturin | 14 | 7 |
| 2 Tvørabáturin | 12 | 6 |
| 3 Gongurólvur | 9 | 5 |
| 4 Riddarin | 9 | 4 |
| 5 Rádni | 5 | 3 |
| 6 Lómur | 5 | 2 |
| 7 Jarnbardur | 2 | 1 |
| **8-mannafør** | | |
| 1 Heiðabáturin | 14 | 7 |
| 2 Argjabáturin | 12 | 6 |
| 3 Árnfirðingur | 10 | 5 |
| 4 Kvíkíkingur | 8 | 4 |
| 5 Knørrur | 6 | 3 |
| **10-mannafør** | | |
| 1 Havnarbáturin | 13 | 7 |
| 2 Ormurin Langi | 13 | 6 |

**Úrslitini á sundalagsstevnu**

| | |
|---|---|
| **5 mannafør dreingir** | |
| 1 Sílið | 5:19:11 |
| 2 Junkarin | 5:22:06 |
| 3 Havfrúgvin | 5:24:04 |
| 4 Tjaldrið | 5:31:23 |
| 5 Teistin | 5:33:13 |
| 6 Strípan | 5:35:13 |
| 7 Tambar | 5:37:13 |
| 8 Katla | 5:41:04 |
| 9 Blikur | 5:44:10 |
| **6 mannafør kvinnur** | |
| 1 Gongurólvur | 6:06:22 |
| 2 Jarnbardur | 6:11:04 |
| 3 Hósvíkingur | 6:16:22 |
| **5 mannafør gentur** | |
| 1 Hvassi | 5:38:01 |
| 2 Drekin | 5:38:04 |
| 3 Junkarin | 5:44:00 |
| 4 Firvaldur | 5:47:22 |
| 5 Jallurin | 5:50:00 |
| 6 Blikur | 5:55:07 |
| 7 Tambar | 5:59:21 |
| **5 mannafør kvinnur** | |
| 1 Sílið | 5:23:21 |
| 2 Frúgvin | 5:25:05 |
| 3 Katla | 5:31:09 |
| 4 Báran | 5:31:09 |
| 5 Erla Kongsdóttir | 5:32:03 |
| 6 Ritan | 5:35:03 |
| 7 Teistin | 5:36:04 |
| 8 Havfrúgvin | 5:43:04 |
| 9 Blikur | 5:45:11 |
| **6 mannafør menn** | |
| 1 Sundabáturin | 7:50:04 |
| 2 Tvørabáturin | 7:51:11 |
| 3 Gongurólvur | 7:58:14 |
| 4 Riddarin | 7:59:21 |
| 5 Rádni | 8:06:10 |
| 6 Lómur | 8:10:06 |
| 7 Jarnbardur | 8:25:00 |
| 8 Víkingur | 8:30:00 |
| **8 mannafør** | |
| 1 Heiðabáturin | 7:05:17 |
| 2 Argjabáturin | 7:07:03 |
| 3 Árnfirðingur | 7:14:17 |
| 4 Kvívíkingur | 7:17:19 |
| 5 Knørrur | 7:20:17 |
| **10 mannafør** | |
| 1 Havnarbáturin | 9:35:01 |
| 2 Ormurin | 9:37:10 |

